# Klaksvíkar býráð virkað í heimildarloysi

**Tann 23. juli staðfesti Innlendismálaráðið, at Klaksvíkar Býráð er farið fram í heimildarloysi, tá eitt byggiloyvi til eini tvíhús varð givið í mars mánaði í ár. Hetta hevur ført við sær, at byggiloyvið er ógildað. Kommunan viðurkennir mistakið, meðan ein sera vónbrotin byggiharri stendur í einari dýrari bíðutíð**

BYGGILOYVI
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

**Klaksvík:**
Eini tvíhús við Garðavegin hava staðið í gerð í eina tíð nú. Stórur partur av grundini er stoypt, men arbeiðið hevur ligið stilt síðani í mai mánaði, meðan málið hevur verið til viðgerðar.

Í vár byrjaði útgrevsturin. Grannarnir vendu sær til býráðsumsitingina við fyrispurningi um, hvat talan var um. Svarið staðfesti, at talan var um eini tvíhús, og at frávik var givið til størri ábygging, enn byggisamtyktin ásetur.

Grein 9 stk. 3 í byggisamtyktini áleggur kommununi at senda byggimál, ið hava frávik frá byggisamtyktini, út til grannarnar til hoyringar.

Hesum noktaði býráðsumsitingin fyri, sambært grannum, sum Sosialurin hevur tosað við og segði, at tað hevði ikki verið siðvenja, og at grannarnir bara kundu gloyma alt um at gera nakað við málið.

### Kærdu

Hetta vildu grannarnir ikki góðtaka, og tey fóru í holt við at savna undirskriftir inn, samstundis sum ein klaga varð send til Innlendismálaráðið. Grundgevingin var, at frávikið frá byggisamtyktini í hesum málinum var alt ov ógvusligt.



*Byggingin av tvíhúsunum við Garðavegin í Klaksvík hevur ligið still síðani í mai mánaði. Og nú hevur Innlendismálaráðið ógildað byggiloyvið*

Tá Innlendismálaráðið kom inn í málið, kravdi tað, at kommunan steðgaði byggingini alt fyri eitt, og at ein grannahoyring skuldi verða.

Byggingin varð síðani steðgað, og tekniska nevnd kallaði so grannarnar inn til hoyringar. Grannahoyringar skulu til, tá frávik skulu gerast frá einari byggisamtykt. Tað er tó ikki álagt kommununum at lurta eftir niðurstøðuni frá slíkari hoyring. Men hon skal verða, tá talan er um frávik. Við á fundinum vóru eisini borgarstjórin, umboð fyri býráðsumsitingina og byggiharrin.

Í slíkum førum hava grannarnir rætt til at viðgera málið í 14 dagar, og hendan rættin ynsktu tey at halda fast við.

Aftan á 13 dagar svaraðu grannarnir og hildu fast við, at onki skuldi byggjast á økinum, og í øðrum lagi, at frávik ikki blivu gjørd í mun til byggisamtyktina.

Málið kom so fyri aftur á býráðsfundi, men býráðið valdi at síggja burtur frá áheitanunum frá grannunum og samtykti byggiloyvið á øðrum sinni.

### Ógildað byggiloyvi

Men málið var framvegis til viðgerðar í Innlendismálaráðnum, sum sostatt tann 23. juli kom við einum úrskurði, har byggiloyvið varð ógildað.

Í niðurstøðuni frá Innlendismálaráðnum stóð millum annað:

At ráðið hevði tikið avgerð um, at Klaksvíkar kommuna ikki hevur heimild til at taka avgerð um frávik í byggisamtyktini, sum varð samtykt tann 27. januar í ár, og at avgerð er tikin um, at byggiloyvið frá 10. mars 2004 við hesum verður ógildað. Eisini boðaði Innlendismálaráðið frá, at tað ikki gekk umsóknini hjá Klaksvíkar býráð um frávikið á møti.

Grannarnir hava sent skriv til býráðið, har tey heita á, at tað framyvir verða grannahoyringar, tá frávik verða gjørd frá byggisamtyktum, og at tað umrødda matrikulnummarið heldur verður nýtt til parkeringsøki og fríøki.

Hetta halda grannarnir fer at gagna grannalagnum best, og vísa tey til tørvin á parkeringsplássum við Sjómansskúlan.

Byggiharrin:

## Umhugsar endurgjald

**Hildebrand Andreassen, sum byggir tvíhúsini við Garðavegin í Klaksvík, sigur, at hann fær onki gjørt so longi sum málið ikki er endaliga avgreitt. Hann sigur, at hann er í einari dýrari bíðustøðu, sum nú er, og hann dylir ikki fyri, at hann umhugsar møguligt endurgjaldskrav**

BYGGILOYVI
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

**Klaksvík:**
– Eg havi ikki fingið nakað endaligt at vita enn. Gott nokk havi eg fingið brævið frá Innlendismálaráðnum, men tá tað er kommunan, sum hevur givið mær byggiloyvið, so er tað vælsaktans hon, sum eisini skal boða mær frá, at tað er burtur, sigur Hildebrand.

Hildebrand er sera vónbrotin av hesum, og noktar hann ikki fyri, at hann umhugsar møguligt endurgjaldskrav.

– Tað kemur nú ann uppá, hvat hetta endar við. Men eg varð steðgaður í mínum arbeiði um hálvan mai, so tað gongur á fjórða mánaði nú, sigur Hildebrand Andreassen.

Hann sigur, at um hatta ikki kemur ígjøgnum, ber ikki til hjá honum at byggja eini tvíhús. Men hann eigur grundstykki, og væntar hann, at hann kortini fer at byggja á tí.

– Men eg sleppi onki, sum nú er, so longi málið ikki er endaliga avgreitt. Ikki so frægt sum at taka formarnar niður, sleppi eg, greiðir hann frá.

Hann hevur miklan ampa av tí, tí at beint við økið liggur eitt spælipláss, og har spæla nógv børn.

– Eg toli ikki tankan um, at onkur børn, sum spæla í grundini og klintrast har, møguliga detta og koma til skaða, so eg havi teknað eina trygging, sigur hann.

### Lægri enn ætlað

Hildebrand greiðir frá, at tvíhúsini eru gjørd lægri fyri nevniliga ikki at órógva grannarnar.

– Tey kundu væl verið hægri, men tað vildi eg ikki, tí tað er so keðiligt fyri grannarnar, tí eru húsini longd fýra metrar ístaðin, sigur hann.

Hetta kostar honum nógvar pengar, at alt bara stendur í hálvum gekki, og hann ikki sleppur at gera nakað sum helst. Og skilir hann ikki, hví tað skal verða so trupult, tá kommunan longu hevur spælt út, at hon ikki ætlar sær at nýta økið til parkeringspláss.

Ei heldur væntar Hildebrand, at um hann hevði roynt at selt grundøkið, at nakar áhugaður keypari hevði verið við verandi støðu.

– Eg meini so við, hvør hevði tímað at keypt hetta grundøkið, sum so nógv rokilsi er av, spyr hann og leggur so afturat, at tað er løgið, tá grannar í økinum, sum sjálvir búgva í húsum, sum møguliga hava fingið frávik, gera vrøvl um hansara.

– Ofta sær ein ikki bjálkan í eygunum hjá sær sjálvum, men flísina hjá hinum beinanvegin, heldur Hildebrand Andreassen fyri.

### Inn í býin at búgva

Ætlaninar hjá Hildebrandi við tvíhúsunum var, at hann sjálvur skuldi búgva í aðrari helvtini, og so sonurin í hinari.

– Vit búgva jú heilt uttast á Bumshamri, so vit sóu hetta sum ein góðan møguleika til at flyta inn í býin at búgva. Men ístaðin eru vit endað í hesu óluksáliga keðiligu støðuni, og kenna okkum hálvavegna sum "forbrydarar", sigur ein vónbrotin Hildebrand Andreassen í telefonini. Hann var burtur í feriu í nakrar dagar, men hann ætlar at fara at tosa við kommununa, tá hann kemur aftur til Klaksvíkar.

# Viðurkenna mistakið

**Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík, sigur, at kommunan viðurkennir sítt mistak í hesum málinum við ikki at fylgja teimum ásettu reglunum, sum siga, at um frávik skulu gerast í einum byggiloyvi, so eigur hetta at verða lagt út til grannahoyringar**

BYGGILOYVI
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík, sigur, at kommunan viðurkennir mistakið og framyvir verða øll møgulig frávik í byggisamtyktum koyrd út til grannahoyringar sambært ásettu reglunum*

**Klaksvík:**
Borgarstjórin sigur, at kommunan hevur biðið sakføraran hyggja málið ígjøgnum, og so kemur hann við einum útspæli.

– Men tað skal ikki vera nøkur loyna, at framyvir fara vit sjálvandi at halda okkum til reglarnar, sum siga, at grannahoyringar skulu til, tá talan er um frávik frá einari byggisamtykt, sigur Steinbjørn Jacobsen.

Somuleiðis sigur hann, at tað er mikið sannlíkt, at fleiri slík mistøk eru hend frammanundan hesum ávísa málinum.

– Men sum sagt so kemur frávik ikki upp á tal aftur uttan grannahoyringar, sigur borgarstjórin í Klaksvík.

Hann leggur dent á, at hóast tað varð sagt í útvarpi Føroya mikudagin, at umtalaða økið einaferð var útlagt sum parkeringsøki, so er hetta ikki rætt.

– Tað hevur ongantíð verðið samtykt, at hatta økið skuldi nýtast til nakað annað enn sethúsabygging. Men tað var gott nokk upp á tal einaferð, men ongantíð samtykt, sigur Steinbjørn Jacobsen. Tað saman sigur formaðurin í teknisku nevnd, Karl Heri Joensen.

Karl Heri Joensen greiðir eisini frá, at frávikið, ið talan er um, er upp á 46 fermetrar.

– Loyvda ábyggingarstigið er 152 fermetrar, og tað sum vit hava fingið umsókn um er upp á 198 fermetrar, greiðir hann frá.

Og tað eru hesir 46 fermetrarnar, sum Innlendismálaráðið hevur gjørt av, at kommunan ikki hevur heimild til at veita, og tí gekk tað ikki umsóknini frá Klaksvíkar kommunu á møti.



# Ríkisfelagsskap ella hvalafelagsskap

**So leingi føroyingar eru í ríkisfelagsskapi við Danmark, kunnu teir gloyma alt um sjálvstøðuga umboðan í altjóða felagsskapum, segði danski uttanríkisráðharrin á vitjan síni í Føroyum mikudagin**

VITJAN
*Edvard Joensen*

Føroyingar kunnu fáa eina fulltrú frá Danmark at luttaka á millumtjóða fundum, har føroysk mál verða viðgjørd. Meira er ikki at heinta har. At hugsa um fullan limaskap í altjóða felagsskapum kunnu vit gloyma.

So greið vóru boðini frá Peri Stig Møller, uttanríkisráðharra, tá hann saman við Jóannesi Eidesgaard, løgmanni, hevði tíðindafund í Tinganesi mikudagin.



*Føroyingar kunnu fáa fulltrú frá Danmark at luttaka á altjóða fundum. Men tit fáa ikki fullan limaskap, segði danski uttanríkisráðharrin á tíðindafundi í Tinganesi mikudagin*

Mynd: Edvard Joensen

Hóast føroyingar fegnir vildu sloppið upp í eitt nú altjóða hvalafelagsskapin IWC, ber tað ikki til sambært uttanríkisráðharranum. Altso so leingi vit eru í ríkisfelagsskapinum.

– Danmark er umboðað av kongi ella drotning. Og drotningin kann ikki býtast í trý, segði uttanríkisráðharrin.

Men veðra eitt nú verjumál, sum hava við Føroyar at gera, viðgjørd, fáa føroyingar fult innlit í tað, sum tosað verður um, lovaði uttanríkisráðharrin.

Løgmaður og uttanríkisráðharrin tosaðu undir vitjanini millum annað um føroysk viðurskifti í hvalaveiðifelagsskapinum IWC.

Tosað varð um støðu Føroya í hesum samanhangi. Komið var inn á burðardygga veiðu av havsins tilfeingi, segði uttanríkisráðharrin og legði afturat, at tað er tað, kjakið eigur at snúgva seg um.

Uttanríkisráðharrin metir ikki, at tað fer at ávirka føroysk viðurskifti nakað, um Danmark tekur undir við sonevndu ES grundlógini.

– Tað verður ikki soleiðis, at nakar tekur nakrar avgerðir viðvíkjandi okkum, sum vit so noyðast at ganga undir, segði hann. Danmark hevur fullan limaskap í EU, og vit verða við til at taka avgerðirnar. Eg síggi ongan vanda í, at tað fer at gera støðu Føroya mótvegis ES verri, um Danmark tekur undir við hesi lógini.

Per Stig Møller vísti á, at arbeitt verður á embætismannastigi víðari við málinum um, hvørjar ávirkanir málið kann fáa fyri Føroyar og Grønland, segði hann.

Bæði løgmaður og uttanríkisráðharrin eru sannførdir um, at ríkisfelagsskapurin hevur tað gott.

– Ríkisfelagsskapurin hevur ongantíð havt tað betri enn tað sama, segði Per Stig Møller. Tað skilst á fundum, vit hava havt bæði við grønlendingar og føroyingar. Allir partar tykjast hava nógv størri virðing fyri hvørjum øðrum, enn tað hevur verið líkt til leingi. Mín fatan er, at ríkisfelagsskapurin hevur ongantíð havt tað betri enn nú, segði danski uttanríkisráðharrin á tíðindafundi í Tinganesi seinnapartin mikudagin.

– Tað er ógvuliga umráðandi við áhaldandi samrøðum millum teir tríggjar partarnar í ríkisfelagsskapinum, segði Jóannes Eidesgaard, løgmaður. Tíðin stendur ikki í stað, og ting broytast alla tíðian. Eisini ríkisfelagsskapurin. Tí er neyðugt, at vit alla tíðina eru greið yvir, har vit flóta og halda farið, vit eru í, viðlíka.

– Eg meti, at allir partar hava gleði av ríkisfelagsskapinum, segði Per Stig Møller, uttanríkisráðharri. Og allir partar eru eftir mínum tykki áhugaðir í, at hann heldur fram. Men tað krevur so eisini eina kenslu av, at hetta er nakað, vit eru felags um, segði hann.

# Summartiltak í Sandavági



*Sandavágur úr Sørpum*

**Sandavágs Ítróttarfelag fer leygardagin at skipa fyri summartiltaki við fjølbroytari skrá**

SUMMAR
*Tíðindaskriv*

Sandavágs Ítróttarfelag fer at enda summarið við einum stórum tiltakið í Sandavági leygardagin. Byrjað verður klokkan um middagsleitið, og hildið verður á út á náttina.

Tiltakið verður hildið bæði kring ítrróttarhúsið og fótbóltsvøllin og á parkeringsøkinum uttan fyri hølini hjá Tryggingarfelagnum.

Heima í bygdini verður stórt laksatorg, har til ber at smakka og keypa royktan laks. Eisini fara handlarnir í Sandavági at hava sølutorg úti hendan dagin. Tombola, loppumarknaður og grill verða eisini á torginum. Fólk, sum hava eitthvørt, tey vilja selja, so sum heimavirki av ymsum slag, fáa eisini møguleika at gera tað hendan dagin.

Undirhald verður bæði til land og til vatns. Í ánni sleppa børnini at rógva í smáum bátum, eins og eisini fjarstýrdir bátar fara at veða a síggja í stóra hylynum. Og á landi sleppa tey at roynsa seg sum motorsúkklu koyrarar. Tað verður á Loftagrund.

Av øðrum tiltøkum kunnu nevnast mat- og køkutombola, hoppiborg, sumoglíming og fiskibrunnur. Sandavágs kirkja er opin fyri vitjandi, og greitt verður frá kirkjuni og tí, sum har er. Eitt nú rúnarsteininum.

Ítróttur verður sum vera man eisini á skránni. Byrjað verður við endaumfari í fótbólti hjá gentum 12-14 ár. Seinnapartin verður skemtidystur á fótbóltsvøllinum millum fráflutt og tilflutt vágafólk.

Rennikapping av serligum slag verður eisini, har runnið verður niðan á Húsafelli og aftur.

Um kvøldið verður drekaflúgving og felagssangur á økinum uttan fyri kirkjuna. Seinni verður so diskotek í SÍF húsinum.

## Sterkt øl á Tórsvølli

**Fólk, sum fara at hyggja at fótbóltslandsdystinum millum Føroyar og Frakland, fáa sterkt øl til keyps uttan fyri gyrðingarnar kring Tórsvøll**

ØLSØLA
*Edvard Joensen*

Ætlanir eru um at selja sterkt øl í Gundadali, tá Føroyar og Frakland fara at spæla landsdyst á Tórsvølli.

Hóast rúsdrekkalógin ikki heimilar tí, eru ætlanir í gongd um at seta upp sølubásar, har til ber at keypa sterkt øl.

Teir, sum standa aftan fyri ætlanina siga við Sosialin, at teimum kunnugt verður slíkt øl selt víða um, tá ymisk almenn tiltøk verða hildin, hóast tað ikki er í tráð við rúsdrekkalógina. Og higartil hevur ikki verið gjørt nakað við tað frá myndugleikanna síðu. Tískil vænta teir heldur ongar trupulleikar av at hava slíka sølu í Gundadali eisini.

– Hóast lógin ikki verður hildin, má hon væl verða líka løtt at bróta hjá øllum, sigur ein teirra, sum Sosialurin hevur tosað við.

Hann roknar við, at tað kann gerast ein rímiliga góð forrætning við slíkari sølu, sigur hann.

Sosialurin hevur roynt at fáa viðmerkingar frá fútanum og løgregluni til tíðindini í hósdagsblaðnum um fría ølsølu á almennum tiltøkum. Eisini var ætlanin at fáa viðmerkingar til tær ætlanir, sum nú eru komnar fram um komandi ølsølu í samband við fótbóltslandsdyst í Gundadali.

Tað hevur, áðrenn blaðið fór til prentingar. Ikki borið til at fingið orð á nakran á fútaskrivstovuni ella hjá løgregluni, sum vil gera viðmerkingar til tíðindini.



*Ætlanir eru um almenna ølsølu í Gundadali í samband við fótbóltslandsdystin millum Føroyar og Frakland*